# Kjak



**Óluva Zachariasen**
*redaktiónsleiðari*

# Viðmerking til tíðindi um Atlantis

*Vit harmast sjálvandi um, at tú heldur, at málið um Atlantis ikki er lýst á rættan hátt í tíðindasendingini í útvarpinum.*

*Til*
*Jógvan Skorheim*
*Formann í stýrinum fyri Atlantis*

Bakgrundin fyri innslagnum var hendan:

1. mars í ár skrivar Klaksvíkar Kommuna undir leigusáttmála við tveir privatmenn, sum skulu reka Mentanarhúsið Atlantis í Klaksvík. Í miðlunum boðaði tú frá, at privata útleiganin varð gjørd fyri at spara kommununi 200.000 kr í árligum rakstri. (Ein upphædd, sum nú ljóðar upp á 300.000 kr sambært tínum skrivi)

Høvuðstreytin í leigusáttmálanum er, at Mentanarhúsið Atlantis framyvir skal rekast sum biografur. Í sáttmálanum stendur enntá, at tað ikki má ávirka biografin negativt, um onnur tiltøk skulu hýsast í Atlantis. Við leiguavtaluni er biografur sostatt vorðin grundarlagið undir øllum virksemi í Mentanarhúsinum Atlantis yvirhøvur.

Nú hevur hetta biografvirksemið so eina eykaútreiðslu við sær upp á eina millión krónur, um biografurin skal halda fram – ein útreiðsla, sum kommunan ikki sleppur undan at gjalda uttan at bróta tann sáttmála, sum skuldi spara kommununi fyri rakstrarútreiðslur.

Tí er tað eftir okkara tykki framvegis rætt at siga, at »tað, sum byrjaði sum ein spariætlan, kann vísa seg at gerast ein dýr loysn fyri Mentanarhúsið Atlantis í Klaksvík«, sum tað varð sagt í innslagnum.

Tað kann væl vera, sum tú vísir á í brævinum, at Klaksvíkar kommuna um 10 ár hevur spart tríggjar milliónir krónur við at leiga Atlantis út til privatfólk at reka. Men tann sparingin kostar also kommununi eina millión krónur – ella ein triðing av spardu upphæddini, tí kommunan hevur bundið seg og leigararnar til at reka biograf í húsinum. Og tað má, alt annað líka, kallast ein »dýr loysn«.

**Tann sparingin kostar also kommununi eina millión krónur – ella ein triðing av spardu upphæddini.**

Til tína viðmerking er annars at siga, at vit gjørdu eitt aktuelt tíðindainnslag um eina óvæntaða, akutta eykaútreiðslu til Mentanarhúsið Atlantis – og ikki eitt innslag, sum skuldi spáa um, hvussu fíggjarstøðan hjá Atlantis møguliga sær út um 10 ár.



**Heri Mohr**

# Landskassin

Føroya landsstýri og løgtingsins fíggjarnevnd eru í álvarsligum trupulleikum. Fótafestið er farið at rilla. Fíggjarlógin hongur ikki saman. Útreiðslurnar eru nógv størri enn inntøkurnar, og at repa seglini tykist nærum ógjørligt. Ikki slepst undan stórum lántøkum. Hvussu og nær er hetta óskilið so komið? Hvussu er tað uppstaðið?

Tað hevur ligið í moldini. Skulu vit finna ein ávísan dag, so má tað vera 1. januar 2002. Tá varð sett niður. Og nú fruktin er komin uppundan, er hon ikki dámlig. Svartaspilla í veltuni.

Í 1998 fingu vit eitt nýtt landsstýri. Tað virkaði alt valskeiðið 1998-2001. Áðrenn tað legði frá sær, hevði tað tryggjað sær, at blokkurin, landskassans ríkisstuðul, skuldi lækkast tann 1. januar 2002 við 366 milliónum og restblokkurin niðurbindast uttan mun til dýrtíð og annað, ið natúrliga ávirkar tey málsøki, sum blokkurin var oyramerktur til, nevniliga heilsuverkið, almannaverkið og skúlaverkið.

Tað hevur almennan áhuga at vita, hvussu væl/vánaliga loysingarlandsstýrið umsat landskassan, skattaborgarans pening, í 1998-2001.

Í tíðarskeiðinum 1998-2001 hevði landskassin samanlagt 3 milliardir í rakstraravlopi og í sama tíðarskeiði 3,7 milliardir í ríkisstuðuli, sum var oyramerktur til heilsuverkið, almannaverkið og skúlaverkið: fólkaskúlin, privatir skúlar, læraraskúlin, handilsskúlin, tekniski skúlin, skúlaheim, maskinskúlin, serstøk frítíðarundirvísing, útbúgvingarstyrkur v. m.

Hetta sama tíðarskeiðið øktust landskassans rakstrarútreiðslur úr 1,4 milliardum til 2,3 milliardir, ella við 64%. Í 2000 kunngjørdi Føroya landsstýri Føroya fólki, at av ríkiskassablokkinum varð ein stív helvt ikki brúkt av tí føroyska samfelagnum, og at í ár 2000 "verður minni enn ein triðingur av tí danska stuðulinum brúktur í samfelagnum. Restin fer til samansparing, sum skal nýtast, um búskapurin verður fyri afturgongd."

Í 2002 byrjaði tað nýggja landsstýrið í somu sporum, sum undanfarna hevði sett eftir seg, men við nýggjum samgonguskjali. Tað gekk ikki long tíð, gott og væl eitt ár, áðrenn samgongan slitnaði við einum braki. Um tað nú veruliga var ein lykil í einari innhurð ella kanska serforsorgin í Føroyum, ið var orsøkin til politiska ruðuleikan úti í Tinganesi, er ongantíð komið fram í ljósið. Í samgonguskjalinum var nevniliga semja um at lækka ríkiskassastuðulin (blokkin) við teimum 117 milliónunum, sum eru oyramerktar til serforsorgina, t.v.s. andveikaforsorg, ellis- og røktarheim, eksternforsorg v.m. Hesum milliónunum ætlaði tað nýggja landsstýrið at beina fyri, á sama hátt sum undanfarna landsstýri beindi fyri 366 milliónum umframt at niðurbinda restina av blokkinum. Mundi nakar hava fingið kaldar føtur av ætlanini við serforsorgini? Um so er, hevði tað hóast alt verið ein glotti í myrkrinum. Men vit eru nógv, sum áhaldandi spyrja: Hví tóku tit stig til at tveita milliardir av almennum peningi burtur? Hví framdu tit hasa skarnsgerð móti Føroya fólki at drena milliardir úr landskassanum? Einki svar. Sum í grøvini. Ikki eitt pipp. Tit duga annars at tosa tykkara søk; larmandi sum tómar tunnur.

Landsstýrið, sum í 2000 kunngjørdi Føroya fólki, at tveir triðingar av tí danska blokkinum skuldi samansparast til nýtslu, um »búskapurin verður fyri afturgongd«, gav árið eftir beint fyri jól donsku stjórnini boð um, at blokkurin skuldi minkast við 366 milliónum tann 1. januar 2002, og at restblokkurin skuldi niðurbindast sama dag. Hetta varð so tann uppsparingin, sum landsstýrið hevði kunngjørt Føroya fólki. Higartil hevur hetta kostað landskassanum meira enn 3 milliardir, ella tað sama sum: ein undirsjóvartunnil, alternativan flogvøll, ein sterkan íleggingargrunn til privatar íleggjarar, granskingargrunn, dagføring av teimum bleytu virðunum, nýggjan studentaskúla v.m. Alt hetta hevði landskassin verið førur fyri at fíggjað, og nógv av tí hevði kanska longu verið gjørt og goldið uttan lántøku, og »arbeiði til allar hendur« hevði kanska ikki verið ein býur í Russlandi, um tey omanfyri nevndu málsøki høvdu fingið ta lógbundnu fíggingina úr blokkinum, sum landsstýri ð lækkaði og bant fyri 1. januar 2002.– Gone with the wind.

Tað ørar. Í 2000 vendi Føroya landsstýri sær til alt Føroya fólk úti og heima við einum bóklingi, har týðandi spurningar viðvíkjandi samfelagsligum og persónligum áhugamálum vórðu »skornir út í papp«, millum annað hvussu tveir triðingar av ríkiskassablokkinum skuldu samansparast. Tað, og eitt nú tað, ið skrivað varð um Ríkishospitalið, er heilaspuni við ongum støði í sannleikanum, altso beinleiðis ósatt. Tað er ræðandi, at slíkt kann koma frá okkara hægsta politiska myndugleika, okkara stjórn, sum við hesum vanvirdi trúvirðið og fekk tann mentala tryggleikan at rilla. Hetta er ósømiligt. Primitivt.

Í tíðarskeiðinum 2002-2005 hevði landskassin samanlagt 801 milliónir í rakstraravlopi, ella umleið 70% minni enn í undanfarna 4-ára skeiði, og 2,5 milliardir í blokkstuðli, ella 32% minni enn í undanfarna 4-ára skeiði. Í hesum sama tíðarskeiði øktust landskassans rakstrarútreiðslur úr 2,3 milliardum til 2,7 milliardir, ella við 22%. Tað skal viðmerkjast, at ruðuleikin undanfarnu ár innibar, at løgtingið í 2004 noyddist at útvega landskassanum pening við øktum avgjøldum. Hesin sami landskassin sum í árunum 1993-2001 hevði konsoliderað seg fra at vera trotabúgv til at vera gullrandaður. Og nú í dag er tað so galið, at landsins politikarar onkursvegna mugu útvega landskassanum eina knappa milliard við lántøku, um hann skal hóra undan.

Í mong ár eru føroyingar áhaldandi ávirkaðir og merktir av politiskari loysingarøsing (fíggjað við skattaborgarans peningi) við ósannindum og við villleiðingum um landskassan og hansara viðurskifti mótvegis ríkiskassanum. Hetta hevur órógvað og skelkað mong fólk í teirra dagliga lívi.

At seta knívin í sjálva mønuna er ikki lukkuligt, soleiðis sum gjørt varð í 2002.

Eyðmýkjandi er tað nú at síggja og hoyra, hvussu landsins kosnu kvinnur og menn aðra hvørja løtu boða frá, at tey royna at finna pening til okkara skúlar og heilsuverk og almannaverk. Tey tykjast leita og jonglera millum játtan og konti og grunnar. Og nú fara tey kanska eisini at leita eftir peningi til veðurtænastuna frá DMI. Sanniliga, tað er eyðmýkjandi fyri okkum, sum í hesum landi búgva. Og verri enn alt: hetta er sjálvgjørt. – Nei, ikki av Marsonnu og Palleba. Av fólki, sum er valt at umsita og ansa eftir almennum peningi.

Demokratiskur landspolitikkur, ið verður skúgvaður til viks av nationalistiskum flokspolitikki merktur av intoleransu og lítlari umhugsan, er um okkara leiðir langt síðan farin í søguna. Tað áttu vit at tikið til eftirtektar. Í sjálvum sær er einki ilt í kenslubornum politikki, ið vanliga hoyrir ungum fólki til. Tvørturímóti. Vit kunnu kanska kalla slíkt teenageara-sturm-und-drang-rembing. Men verða hesar rembingar misbrúktar, kann tað órógva konstruktivan politikk til óbótaligan skaða fyri land og fólk.

Nýtt landsstýri við nýggjum samgonguskjali varð veruleiki 2008. Men tað kann ikki hava verið sum at siga tað. Alt var niðurundirkomið: Landskassin í andaneyð, svartaspilla í veltuni, sjálvur hugburðurin til okkara samfelagspolitikk og samfelagsfyrisiting avskeplaður. At lúka akur og veltu í órøkt krevur nógv arbeiði og tol og tíð.

ES.: Tøl og procent eru fingin úr landskassans ársroknskapum.